# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Hjalmar í Tøðuni 75 ár

26. juni fyllir Hjalmar Joensen, vanliga nevndur Hjalmar í Tøðuni, 75 ár.

Hjalmar er sonur Andreu og Olevinus í Tøðuni í Fuglafirði.

Sum heilt ungur fór Hjalmar til skips, har hann starvaðist í mong ár. Tá ið hann fór í land, gjørdist hann vrakari. Tá ið sildafiskiskapurin var upp á tað besta, og sildin varð løgd í tunnur, arbeiddi hann við at leggja sild í tunnur á kajini í Fuglafirði. Tað lá væl fyri, kvikur og ágrýtin sum fáur.

Seinni arbeiddi hann á flakavirkinum í Fuglafirði, seinni úti í Runavík.

Hjalmar var giftur við Helmu, sum fyri nøkrum árum síðani doyði. Børnini vóru Herman, Annika,

Ovi og Sigbjørg. Trý tey fyrstnevndu búgva í Fuglafirði, meðan síðstnevnda býr í Danmark.

Hjalmar hevði óvanliga stóran áhuga fyri ítrótti.Sum ungur var



hann fastur leikarai á besta liðnum í Fuglafirði. Tá hann gavst at spæla, so fór hann upp í nevndararbeiðið hjá ÍF, har hann helst hevur sett met sum formaður. Hetta arbeiðið gekk hann upp í við lív og sál, og glaður var hann, tá hann sá góð úrslit fyri felagið, bæði innan fótbólt, hondbólt ella róður.

Tey árini gott vinarbýarsamstarv var millum Fuglafjørð og Selfoss, og fuglfirðingar fóru til Íslands at spæla, ja so var Hjalmar við. Ræðið lá fyri at tosa íslendskt, tí sum yngri hevði hann eisini verið í í Ísandi, og nógvar vinir fekk hann har,sum hann enn hevur.

Stóran áhuga hevði hann somuleiðis fyri sjónleiki. Tað var tann tíð Í Fuglafirði, at nógvir sjónleikir vórðu framførdir, og eisini her tók Hjalmar lut.

Hjalmar er framvegis líka hugaður fyri ítróttini - ÍF er farmvegis hansara lið.Hóast hann ikki er so nógv í Fugalfirði longur, so hevur alt, sum fer fram í heimbygdini, hansara stóran áhuga.

Hjalmar heldur føðingardagin í Lonini í Fuglafirði sunnudagin frá klokkan 16 til klokkan 22.

Hjartaliga tillukku Hjalmar.

**ÍF-arar**

### 80 ár

Í dag, 28. juni, verður Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, 80 ár. Føðingardagin heldur hann í Danmark. Adr. er: Nørupvej 28, 2610 Rødovre.

## Bárður Larsen løgfrøðisligur ráðgevi í Kommunusamskipanini

Kommunusamskipan Føroya hevur í dag sett Bárð Larsen í starv sum løgfrøðisligur ráðgevi í KSF.



Bárður hevur tikið løgfrøðisligt embætisprógv við universitetið í Keypmannahavn í 2002. Hann starvaðist í 2 ár sum fulltrúi í Løgmálaráðnum, sum seinni varð Innlendismála-ráðið. Hann var eitt skifti skrivari í Grundlógarnevndini og hevur seinasta hálva árið arbeitt sum sjálvstøðugur ráðgevi.

Bárður hevur eisini verið ritstjóri í Føroyskum Lógarriti og hevur skrivað greinar um føroyska løgfrøði m. a. í danska tíðarritið »Juristen« og í Føroyskum Lógar Ritið FLR.

## Dynamitt fer í luftina á Summar Festivalinum

**Stórseljandi poppbólkurin við teimum mongu landaplágunum aftan fyri seg fer at spæla á Summar Festivalinum. Bólkurin lovar eitt ordans brak við øllum teimum bestu sangunum hjá sær**

SUMMARFESTIVALUR

Dynamitt er ein søga fyri seg í føroyskum tónleiki. Bólkurin, sum ongantíð reypaði sær av at verða tann tekniskt besti bólkurin, dugdi at fáa lív í sum eingin annar, og teir skrivaðu eina landaplágu fyri og aðra eftir.

Sum dansibólkur frá 1984 og nógv ár fram var Dynamitt í serflokki. Bólkurin kundi gera eitthvørt grátt leygarkvøld til eina oasu av lívi, undirhaldi og gleði, og á teirra ferð kring Føroyar vunnu teir ein stórsigur fyri og annan eftir sum besti dansibólkurin í landinum.

Og tað er ein nógv umtala hending, tá ið Dynamitt – mitt í tí heila – fór til Danmarkar at vera við í eini tónleikakapping hjá Se & Hør og ruddaði alla mótstøðu av vegnum við tí øra sanginum, Aja Aja Umba.

Á útgávum síðani 1987 hava teir eisini setti síni týðuligu spor í føroyska tónleikalandslagnum. Bandið Myndin kom í 1987, og á hesari útgávu var millum annað sangurin um Ommuna, sum gjørdist ein tann mest spældi sangurin í føroyskum útvarpið í langa tíðir.

Síðani eru fleiri útgávur komnar frá bólkinum, og sangir sum Pápi Tín Býr Ei Í Tórshavn, Bangin, Abbi, Grøv Nummar 13, Fløskan hava gjørt bólkin til ein tann best seljandi bólkin í føroyskum tónleiki.

Dynamitt fer at spæla á Summar Festivalinum við fullari manning, og nú sum fyrr eru oddamenninir í bólkinum Niklas Heri Jákupsson og Hans Jacob Nystrøm.

## Patrick de Neergaard prædikar á ólavsøku

Tað verður Patrick de Neergaard, sóknarprestur í Suðuroyar sunnara prestagjaldi, sum prædikar á ólavsøku í ár.

Ólavsøkuprædikan er eitt slag av elddópi hjá prestunum. Tað gongur upp á skift at prædika á ólavsøku, og er tað altíð tann av prestunum, sum hevur verið longst í starvi, men sum ikki hevur prædikað á ólavsøku áður, sum fær heiðurin.

## Eingin ferðsla gjøgnum Norðoyatunnilin

NORÐOYATUNNIL

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Stjórin fyri Norðoyatunnilin sigur, at tað verður bara arbeiðskoyring og neyðsendarkoyring í Noroyatunlinum, meðan arbeiðið verður gjørt liðugt.

Undirsjóvartunnilin millum Klaksvík og Leirvík er nú veruleiki. Tunnilin er opin allan vegin millum Norðoyggjar og Eysturoynna, og ein partur av teinum er eisini asfalteraður.

Men hóast tað nú kann koyrast undir Leirvíksfirði, so sleppa fólk ikki fram at tunlinum fyrr enn hann er heilt liðugur.

– Tunnilin er at rokna sum eitt arbeiðspláss, og tí loyva vit bara arbeiðskoyring og neyðsendarkoyring í



tunlinum. Vit geva ikki undantøk til aðra koyring, tí tað verður ein skrúva uttan enda, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri fyri P/F Norðoyatunnilin.

**Eingin almenn ferðsla**

Leygarkvøldið royndu nógv fólk at koyra ígjøgnum tunnilin. Bussar fóru gjøgnum tunnilin við gestunum til veitsluna hjá Norðoyatunlinum, og heimaftur vóru ítróttarfólk, sum komu úr Suðuroynni, uppi í bussunum.

Men hóast hendan koyring smakkar av meira, so mugu fólk eisini næstu mánaðirnar sigla um Leirvíksfjørð.

– Vit loyva sjúkraflutningi ígjøgnum tunnilin, tá ið tað ber til, men annars letur tað seg ikki gera at sleppa ígjøgnum. Tað verður eingin almenn ferðsla ígjøgnum tunnilin, fyrr enn hann er liðugur næsta ár, sigur Dávur Reinert Hansen.

Les meira um Norðoyatunnilin á síðunum 20 og 21.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu okkum samkenslu, tá kæra kona, mamma, vermamma og omma okkara

**Ása Simonsen**
Tórshavn

andaðist og varð jarðað.

Eisini hjartans tøkk fyri góða hjálp til ervið.

*Familjunnar vegna*
**Jóannes**